# Ársfrágreiðing 2025

**Rættindafelagsskapurin FJØLRIT**
**Februar 2026**



Fjølrit fekk í 2025 egna skrivstovu í Lützenstrøð 4, har LISA og onnur mentanarfeløg og -stovnar eisini halda til.

## Endamálsorðing

Fjølrit tryggjar burðardyggu listaringrásina
– at rættindahavar fáa eitt sømiligt nýtslugjald, tá ið verk teirra verða endurgivin og nýtt.

## Framtíðarhugsan / Mál

Fjølrit skal umsita øll nýtslugjøld, ið eru fevnd av føroysku upphavsrættarlógini.

Fjølrit skal vera vitanardepil innan upphavsrættindi, bindiliðið millum allar partar, fevndir av lógini, og virkið kunna um økið.

## Kall / Strategi

- Vit hava sterkar førleikar innanhýsis í Fjølrit
- Vit eru "slóðbrótandi" og ganga virkið fram
- Vit dagføra støðugt okkara vitan um upphavsrætt í Føroyum eins og í útheiminum
- Vit víðka um umboðanina
- Vit miðla og kunna um upphavsrætt
- Vit eru bindiliðið millum rættindahavar, brúkarar og myndugleikar

# Um Fjølrit

Fjølrit er meginfelag hjá feløgum, sum umboða rættindahavar, tá ið verk, vard av lógini um upphavsrætt, verða nýtt. Brúk merkir øll endurgeving – ljósriting, avriting, fjølriting, talgilding, deiling og onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg við framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniðið verkið er skapt ella er til taks.

Peningurin, sum Fjølrit fær inn, fer út aftur til rættindahavarnar, sum eiga verkini. Fjølrit leggur dent á, at nýtt mentanarligt tilfar verður skapað í Føroyum. Hetta rópa vit eina mentanarliga ringrás, ið fær høvundar og listafólk annars at menna føroyska list og mentan. Fjølrit hevur sum felagskapur onki sjálvstøðugt fíggjarligt endamál.

## Limafeløg

Hesi feløg eru limir í Fjølrit, og tað eru hesar listagreinar, Fjølrit umboðar:

- Rithøvundafelag Føroya
- Føroysk tónaskøld
- Føroysk myndlistafólk
- Føroyskir yrkisfotografar
- Føroysk bókaforløg
- Føroya miðlafólk

## Umboðsráðið

Hvørt limafelag tilnevnir eitt umboð og eitt varaumboð í umboðsráðið. Umboðsráðið skal:

- gera av, hvussu Fjølrit skal virka
- velja stjórnina
- hava eftirlit við arbeiði stjórnarinnar
- eftir uppskoti frá stjórnin gera reglugerð um handfaring av viðurløgum

## Lóg um upphavsrætt

Fjølrit hevur loyvi frá Mentamálaráðnum at virka sum rættindafelagskapur, í samsvari við § 40, stk 1 í løgtingslóg um upphavsrætt. Galdandi loyvið varð endurnýggjað í februar 2024 og er tað galdandi fram til 31. mars 2029.

## Stjórnin og dagliga umsitingin

Stjórnin skipaði seg beint aftaná aðalfundin 24. mars 2025 og er hon mannað soleiðis:

- Helle Thede Johansen, forfólk
- Kim Simonsen, skrivari
- Beinir Bergsson, kassameistari

Umsiting og ráðgeving

- Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð er settur í hálva tíð sum aðalskrivari
- Símun Petur Venned starvast fulla tíð sum KT-mennari
- Jónas Tór Næs er, sambært avtalu, løgfrøðiligur ráðgevi hjá Fjølrit
- Jákup Samuelsen er knýttur at Fjølrit sum bókhaldari

Samband fæst við at senda teldupost til post@fjoelrit.fo ella ringja 23 86 00 ella 23 86 01.

# Ársfrágreiðing fyri árið 2025

**Til aðalfundin 18. februar 2026**

## Árið ið fór

Árið 2025 hevur verið merkt av broytingum innan fleiri øki.

**Skrivstovuhøli**
Síðan 1. apríl 2018 hevur Fjølrit havt eitt skrovstovupláss í íverksetarahúsinum Hugskotinum á Vestara Bryggju í Havn. Húsaleigan var hóskandi, 1.100 kr. mánaðarliga, og umframt skrivstovumøblar, var atgongd til tekøk, internet, fundarhøli, printara og annað. Í apríl 2025 varð leigusáttmálin víðkaður til tvey pláss, soleiðis at bæði KT-mennarin og aðalskrivarin kundu arbeiða har samstundis. Húsaleigan tvífaldaðist við hesum til kr. 2.200 mánaðarliga.

Við tíðini kendist tað sum, at okkara virksemi ikki hóskaði so væl saman við íverksetarum, so tá møguleikin í summar stakk seg upp at fáa innivist hjá Listafólkasamband Føroya á Lützenstrøð 4, og samstundis rinda lægri húsaleigu, 1.212 kr. mánaðarliga, valdi stjórnin at taka av. Hølið í Lützenstrøð 4, sum er 17 m2 stórt, er leigað frá 1. august 2025 at rokna, og gótt pláss er nú fyri, at bæði KT-mennarin og aðalskrivarin kunnu arbeiða í senn og samskifta, umframt at løtt atgongd er til samskifti og samstarv við LISA og listafólk sum heild, sum halda til í húsinum.

Á Lützenstrøð er atgongd til internet íroknað húsaleiguna, eins og streymur, hiti og atgongd til køk. Innbúgvið var tó avmarkað og slitið. Tí valdi stjórnin at játta innkeyp av tveimum skriviborðum, sum kunnu koyrast upp og niður, umframt tveimum kontórstólum. Samstundis varð keypt tráðleys mús og knappaborð til farteldu, umframt ymiskt annað til skrivstovuhald.

**Bankarenta**
Rentan á okkara innlánskontum hevur í nógv ár verið 0,00 %, hóast vit hava rímiliga stórar upphæddir standandi. Aftan á aðalfundin í mars 2025, sendi felagið fyrispurning til BetriBanka, um møguleikan at fáa innlánsrentu á innistandandi hjá felagnum. Ráðgevin skeyt upp, at vit fluttu ein part av pengunum á 12 mðr. uppsagnarkonto, har rentan er 2,1 %.

Á stjórnarfundi 10. apríl 2025 tók stjórnin avgerð um at flyta tann partin av pengunum, sum ikki skal ella kann rindast út fyrr enn um í minsta lagi eitt ár, á 12 mðr uppsagnarkonto. Ásett varð samstundis í mannagongdum felagsins at minnast til at siga upphæddirnar upp, 12 mðr. áðrenn tær skulu nýtast til útgjald.

**Talgildar fráboðanar**
Fjølrit hevur havt ta mannagond at senda ársuppgerðir talgilt til rættindahavar umvegis MínBoks. Einans rættindahavar, sum ikki hava Vangan, hava fingið uppgerðina sum vanligt bræv. Talgilda loysnin fekk uppgerðirnar tryggari og skjótari fram til móttakaran enn postsendingar, og harumframt spardi Fjølrit útreiðslur til porto.

1. januar 2025 broyttust tó treytirnar fyri at nýta MínBoks, og kostnaðurin hækkaði munandi. Rindast skal nú eitt íbindingargjald, eitt fast mánaðargjald, umframt ein upphædd per bræv. Stjórnin samdist um, framyvir at senda ársuppgerðirnar við telduposti til móttakaran. Viðkvæmar upplýsingar verða tó tiknar burtur úr, áðrenn teldupostурin verður sendur. Í teldupostinum verður fráboðað, at móttakarin kann venda sær til Fjølrit, um honum tørvar fleiri upplýsingar.

Umhugsað verður, um Fjølrit skal seta upp eina skipan, soleiðis at listafólk sjálvi kunnu rita inn á sín vanga, broyta adressu um neyðugt, og kanna um tey hava fingið viðurlag, nær og hvat fyri.

**Fyrispurningar**
Umsitingin hevur fingið nakrar fyrispurningar um upphavsmenn til ávís verk. Tílíkir fyrispurningar eru vaksandi í tali, og tekur tað tíð frá umsitingini. Stjórnin gjørdi tí í 2025 av at áseta kostnað fyri hesa tænastu. Kravt verður í minsta lagi 450 kr. fyri at svara tílíkum spurningum.

Fyrispurningar hava eisini verið í sambandi við viðurlag fyri almannakunnger av verkum á føroyskum, har tað vístu seg, at neyðugu rættindi ikki vóru fingin til tess. Heitt varð á brúkaran um at fáa neyðug rættindi til vega.

Eitt listafólk hevur vent seg til Fjølrit at biðja um hjálp til at gera vart við brot á upphavsrættin. Verk hjá listafólkinum eru vorðin nýtt, uttan at listafólkið er vorðið spurt, og tí uttan loyvi frá rættindafólkinum. Løgfrøðingurin, sum er knýttur at Fjølrit, Jónas Tór Næs, hevur orðað ein frymil til eitt skriv, har gjørt verður vart við, at talan er um brot á upphavsrættindi, og at rættindahavin hevur rætt til viðurlag.

**Yvirlýsing um nýtslu av AI (vitlíki)**
Norðurlendsku feløgini hava saman orðað eina yvirlýsing um vitlíki og upphavsrætt, har heitt verður á øll, sum á ein ella annan hátt nýta AI, um at virða upphavsrættindi.

> *Tørvur er á reglugerð innan økið, at kravt verður gjøgnumskygni, soleiðis at tað er møguligt at fáa innlit í, hvat tilfar verður nýtt til at menna vitlíki.*

Menningin av AI er grundað á menniskjaligan kreativitet. Alneyðugt er, at kravt verður, at AI-amboð verða ment við virðing fyri upphavsrættindum. Tørvur er á reglugerð innan økið, at kravt verður gjøgnumskygni, soleiðis at tað er møguligt at fáa innlit í, hvat tilfar verður nýtt til at menna vitlíki. Yvirlýsingin er at finna á heimasíðunum hjá okkara norðurlendskum systurfeløgum, og til ber at finna hana, um leitað verður eftir: “A Joint Statement on AI Licensing from the Nordic Reproduction Rights Organisations”.

Danska “Rettighedsalliancen”, sum er eitt meginfelag fyri 29 donsk rættindafeløg, sendi í oktober 2025 eina áheitan til danska mentamálaráðharran, um at virka fyri greiðum reglum fyri vitlíki og at vísa virðing fyri upphavsrættindum.

**Vitlíki í Føroyum**
Vitlíki er vorðið eitt málsøki undir Fíggjarmálaráðnum.

“*Vit skulu gera íløgur í vitlíki, tí vit vilja tryggja, at Føroyar fáa lut í teimum møguleikum, sum tøknin gevur – men hetta skal gerast við ábyrgd og øllum neyðugum fyrilitum,*” segði Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum, í tíðindaskrivi, 7. oktober 2025.

*Fyrireiking til Heildarætlan*
Arbeitt verður nú við at orða eina Heildarætlan fyri almenna nýtslu av vitlíki. Gjaldstovan hevur valt Flowcore, við Vitlíkisstovuni sum undirveitara, at standa fyri fyrireikandi arbeiðnum. Skipað verður fyri evnisverkstovum, við fólki úr ymiskum feløgum, arbeiðsplássum, umsitingum og øðrum, har Vitlíki hevur ella væntast at kunna fáa eina ávirkan. Endamálið er at hoyra hvørja áskoðan fólk hava: Hvussu kann vitlíki gerast ein viðleikari í menningini av føroyska samfelagnum? Hvørjar avbjóðingar eru, sum týdningarmikið er at geva gætur? Hvørji tilmæli hava ymsu áhugapartarnir innan teirra øki?

Umboð fyri LISA / Listafólkasamband Føroya hava til nú luttikið í tveimum av tilsamans seks evnisverkstovum. Tann fyrra við heitinum “Føroyskt fyrst – hvussu kann vitlíki stuðla varð-veitslu og menning av føroyskum máli?” Tann seinna hevði evnið: “Etikkur og moralur – er alt innan fyri etisk og moralsk mørk?" Umboðini fyri LISA nýttu høvið til millum annað at gera vart við upphavsrættindini hjá Listafólkum; at Vitlíki kann nógv, men mangan er Vitlíkið ment við grundarlagi í upphavsrættarvardum verkum, uttan at rættindini verða vird.

*Lógarverk innan økið*
Tað tykist sum, at summi halda, at “Lóg um upphavsrætt” er ein forðing fyri menningini av Vitlíki, og harvið fyri menningini av føroyska samfelagnum, og at tað tí er neyðugt at broyta lógina. Eftir okkara fatan er tað ikki so. Tað ber væl til at menna Vitlíki, við galdandi lóggávu, men sum við øllum øðrum lógum, skal eisini hendan lógin haldast, og upphavsrættindini skulu virðast.

> *Tað hevur stóran týdning, at politiski myndugleikin á økinum tekur ábyrgd og gongur á odda í at seta krøv um gjøgnumskygni og at virða upphavsrættin, tá ið vitlíki verður ment og brúkt.*

Tað sum krevst er, at tey, sum fáast við at menna vitlíki, eru væl kunnað um "Lóg um upphavsrætt", og at tey, har tað er neyðugt, gera eina avtalu við Fjølrit um nýtslu, so at rættindahavar kunnu fáa tað nýtslugjald, tey hava rætt til, tá ið teirra verk verða nýtt. Her hevur tað stóran týdning, at politiski myndugleikin á økinum tekur ábyrgd og gongur á odda í at seta krøv um gjøgnumskygni og at virða upphavsrættin, tá ið vitlíki verður ment og brúkt.

*Kunning og mannagongdir*
Neyðugt er tó eisini, at tey, sum brúka vitlíki, í øllum liðum, eru tilvitað um, nær nýtslan ger seg inn á upphavsrættin. Tað er skjótt og lætt at leggja ein tekst upp og heita á vitlíkið um at umseta tekstin ella gera ein samandrátt. Men er talan um ein upphavsrættarvardan tekst, sum brúkaran ikki hevur fingið loyvi til at brúka, hevur hann í veruleikanum brotið "lóg um upphavsrætt".

Mælt verður tí til, at virki, stovnar, almenn umsiting og so framvegis, orða eina greiða innanhýsis mannagongd fyri brúk av vitlíki. Týdningarmikið er eisini, innan skúlagátt, at lærarar og næmingar fáa gjølla kunning um "Lóg um upphavsrætt", og nær ein ger seg inn á hana og ikki.

> *Mælt verður til, at virki, stovnar, almenn umsiting og so framvegis, orða eina greiða innanhýsis mannagongd fyri brúk av vitlíki.*

*Altjóða mál*
Ein av ágóðunum, vit fáa við at vera partur av altjóða felagsskapinum IFFRO, er leypandi kunning um hendingar innan upphavsrætt á altjóða pallinum. Herímillum fingu vit í oktober 2025 kunning um eitt sakarmál í USA, har felagið Anthropic, sum eigur vitlíkistænastuna Claude, varð stevnt fyri brot á upphavsrættin í sambandi við menning av vitlíki. Úrskurðurin hevði við sær, at Anthropic hevur avsett 1,5 milliardir USD til útgjald til teirra, sum eiga verk, sum eru brúkt í menningini av vitlíkistænastuni.

Rættindahavar, sum eru búsitandi uttan fyri USA, fáa bert part av hesum við at finna verk síni gjøgnum leititænastu, og skulu so fylla út oyðublað áðrenn 23. mars 2026. Tað skal nevnast, at einhvør rættindahavi, sum tekur av møguleikan at fáa útgoldið part av rættarsáttinum, fráskriva sær rættin at leggja sak móti Anthropic fyri sama brúkið á øðrum sinni.

---

## Avtalur

**Kringvarp Føroya**
Nýggj avtala varð loksins undirskrivað millum Kringvarp Føroya og Fjølrit (vegna Rithøvundafelag Føroya) tann 6. februar 2025. Avtalan hevur millum annað við sær, at Kringvarpið kann leggja tilfar út á appina VIT, og at rindað verður sama minuttgjald, sum hevði tilfarið verið lisið upp.

Arbeitt verður við at gera eina ískoytisavtalu, sum ásetir, í hvønn mun Kringvarp Føroya fær loyvi at nýta vart myndatilfar, tá ið tey leggja upplisin verk upp á heimasíðuna ella út á Vit appina. Fyri hetta skal sjálvsagt eisini ásetast eitt viðurlag til rættindafólkini.

**Nýtsla innan útbúgving og á stovnum**
Sum er hevur Fjølrit givið fólkaskúlum og kommunalum stovnum annars loyvi at avrita upphavsrættarvard verk (móti viðurlagi) umvegis eina avtalu við hvørja einstaka kommunu. Viðvíkjandi avritan á Fróðskaparsetri Føroya, miðnámsskúlunum og hægri útbúgvingum annars, er loyvið at avrita givið umvegis avtalu við Mentamálaráðið.

Samráðingar hava í langa tíð verið millum Kommunufelag Føroya, Undirvísingarstýrið og Fjølrit um at sameina avtalurnar, soleiðis at ásetan av viðurlagnum er tengt saman, og rammurnar fyri avritan eru eins, óansæð innan hvørja útbúgving avritanin fer fram.

Við árslok 2025 tykist semja vera um rammuna, og farið er nú undir at skilmarka ymisk hugtøk sum til dømis: lesandi, næmingar, stakgreinalesandi -> ársnæmingar.

**Fólkakirkjan**
Umboð fyri Fjølrit vóru aftur á fundi á bispagarðinum 29. September 2025. Við vóru hesa ferð eisini umboð fyri Føroya Stiftsstjórn, umsitarin av Kirkjugrunninum og altso fíggjarligu viðurskiftunum hjá prestagjøldunum, umframt fíggjarleiðarin.

Semja er um, at vard verk verða nýtt innan fólkakirkjuna. Avbjóðingin er at nágreina, í hvønn mun, og hvussu nógv, umframt áseting av einum rímiligum viðurlagi til rættindafólk afturfyri.

Aðalskrivarin vitjaði eftirfylgjandi Hoyvíkar Kirkju, fyri at fáa betur innlit í vavið av nýtslu. Eitt uppskot til, hvørji sløg av nýtslu skulu verða fevnd av einum sáttmála millum Fólkakirkjuna og Fjølrit, er sent Jógvan Fríðriksson, bisp.

**Máltøknidepilin**
Starvsfólkini á Máltøknideplinum arbeiða miðvíst við at menna føroyska máltøkni. Í 2025 fingu tey stuðul úr NordForsk til CAALLM-verkætlanina, sum er ein norðurlendsk-baltisk samstarvsverkætlan um skynsama nýtslu av vitlíki. Játtanin til Máltøknidepilin á fíggjarlógini er hækkað fyri 2026, so politiskur vilji er til at stuðla og menna føroyskt vitlíki.

Fjølrit hevur verið á fundi við starvsfólkini. Máltøknidepilin ger seg, eftir teirra fatan, ikki inn á upphavsrættin, tá ið tekstir verða viðgjørdir og nýttir í føroyskum tekstagrunni. Men hugtakið "nýtsla" má nágreinast, og ein avtala millum Máltøknidepilin og Fjølrit, vegna rættindahavarar, eigur at verða gjørd.

**Føroyar lesa og rithøvundavitjanir**
Høvuðsendamálið hjá Fjølrit er ikki at stuðla fíggjarliga, men at tryggja at rættindahavar fáa eitt sømiligt nýtslugjald, tá ið verk teirra verða nýtt. Viðurløg, sum ikki kunnu býtast út, kunnu tó, sambært "Reglugerð fyri handfaring av viðurløgum" §4 pkt. 5, nýtast til millum annað tiltøk til mentunarliga virðisøking.

Grundað á hetta játtaði Fjølrit 100.000 kr. skúlaárið 2023/24, og 50.000 kr. skúlaárið 2024/25, til at fáa gongd á eina nýggja skipan við rithøvundavitjanum á skúlum, sum Rithøvundafelag Føroya og Føroyar Lesa tóku stig til. Skipanin hevur verið væl móttikin av brúkarunum, og Barna- og útbúgvingarmálaráðið játtaði aftur pengar til skúlaárið 2025/26.

Av tí at talan frá byrjan av var um, at Fjølrit bara skuldi stuðla í fyrstani, so at skipanin kom í gongd, avgjørdi stjórnin í 2025, at stuðulin ikki skuldi halda fram, og at aðrir partar máttu taka yvir. Tað er tíverri ikki hent, og tí hevur skipanin ikki virkað skúlaárið 2025/26. Ógreitt er, um skipanin fæst at virka aftur frá komandi skúlaári.

## Innkomin peningur

Avtalan við Mentamálaráðið fevnir um brúk av vardum verkum innan miðnámsskúlar[1], innan hægri lesnað[2] og á Próvstovuni. Rokningarnar vórðu rindaðar stundisliga. Inn komu 1.020.979,65 kr.. Hetta er ein hækking á 22.000 kr. Í mun til árið fyri. Hækkingin kemur frá øktum næmingatali.

Við atliti at fólkaskúlunum, var talan um 7502 fólkaskúlanæmingar á kr. 200 fyri skúlaárið 2024/25, og inn komu 1.523.064,00 kr. Hetta er ein hækking á slakar 33.000 kr. í mun til árið fyri. Tíverri eiga vit framvegis pening tilgóðar hjá Skopunar Kommunu, áljóðandi 11.000 kr.

Umvegis avtalu við KVF komu inn 282.788,98 kr.. Hetta er ein hækking á slakar 10.000 kr. í mun til árið fyri. Hækkingin kundi annars væntast at verða nakað størri, við tí at avtalan er víðkað, men tað sær út til, at KVF hevur fastsett slakar 300.000 kr. um árið til upphavsrættindi innan okkara øki.

Fyri fyrstu ferð hevur felagið í 2025 fingið pengar inn eftir § 38 í upphavsrættarlógini um fylgirættargjald. Her er talan um gjald, sum upphavsmaður hevur rætt til, tá ið eintak av listaverki hjá vikomandi verður endurselt. Hetta

[1] Miðnámsskúlarnir eru sbr. Fíggjarlógini: Glasir, Miðnám á Kambsdali, Miðnám í Vestmanna, Miðnám í Suðuroy, Tekniski skúli í Klaksvík - (Klaksvíkar HF-skeið) og Heilsuskúli Føroya

[2] Hægri lesnaður er sbr. Fíggjarlógini: Fróðskaparsetrið, Vinnuháskúlin, Sjónám og Føroya Brandskúli

hendi, eftir at Fjølrit á heysti 2024 kunnaði gallaríir og onnur, sum fáast við at keypa og selja list, um hesa skyldu, tey hava sambært § 38, og um, at tað er Fjølrit, sum krevur inn hetta gjald vegna rættindahavan. Í 2025 komu soleiðis inn 4.993,00 kr., sum trý listafólk eiga.

## Skrásettir rættindahavarar

Lóg um upphavsrætt §41 ásetir millum annað: "*Viðurlag, sum felagsskapurin krevur inn, skal avroknast til viðkomandi upphavsmann.*"

Fyri at kunna avrokna til viðkomandi upphavsmann, er neyðugt fyri fyrst at innheinta kunning um, hvørji verk eru nýtt, hvussu nógv, og hvør rættindahavari er/u. Nýtt verða námsætlanir, pensumlistar og líknandi, fyri at fáa sum flest upplýsingar um nýtslu.

Tá ið nýtslan er skrásett, og klárt er at rinda út, kemur so spurningurin, um Fjølrit hevur upplýsingarnar, sum eru neyðugar fyri at kunna rinda upphæddin út til rætta viðkomandi: navn, p-tal, peningastovn og kontonummar.

Við árslok 2024 vóru 318 skrásettir rættindahavar. Av hesum vóru 31 feløg. Í 2025 hava 32 nýggir rættindahavar skrásett seg hjá Fjølrit, av hesum fimm feløg. Tilsamans eru sostatt 350 skrásettir rættindahavar. Enn er eingin rættindahavi skrásettur, sum er føddur í hesum áratúsundinum.

Sambært § 43 í upphavsrættarlógini, fyrnast viðurlag fyri nýtslu av vardum verki 3 ár frá ársenda av tí árinum, tá ið verkið var nýtt. Í virki Fjølrits kunnu vera tríggjar orsøkir til, at viðurløg enda við at fyrnast:

1. Viðurlagið er avsett til individuelt útgjald, men viðkomandi upphavsfólk hevur ikki skrásett seg hjá Fjølrit við neyðugu upplýsingunum fyri at fáa útgjald.

Starvsfólkini hjá Fjølrit brúka nakað av orku at royna at finna rættindahavar, upplýsingar um møguligar arvingar og líknandi, men ikki altíð ber á mál. Hugsast má eisini um, hvussu nógv tíð og orka verður nýtt til hetta, og harvið peningur til umsiting. Við ársenda 2025 fyrndust 229.757,06 kr. av hesi orsøk.

2. Viðurlagið er avsett til verk við útlendskum upphavsfólki: Hesi verða bert útgoldin eftir áheitan frá upphavsfólkinum.

Sum nú er, er hetta bert viðkomandi fyri individuella útgjaldið í samband við avtaluna við Mentamálaráðið. Nógv av tilfarinum, sum verður brúkt, serliga innan hægri lesnað, er útlendskt. Vit hava millumlandaavtalur við systurfeløgini í teimum flestu av grannalondunum, sum hava við sær at vit umsita hetta viðurlagið, men ikki senda tað víðari, hvørki til viðkomandi upphavsrættarfelag, ella til upphavsfólkið sjálvt, uttan áheitan. Við ársenda 2025 fyrndust 336.058,77 kr. í hesum bólki.

3. Innsavnaðu upplýsingarnar um nýtslu eru ikki nøktandi grundarlag til at gjalda út alla upphæddina individuelt, sum er komin inn gjøgnum tilhoyrandi avtalu.

Hetta ger seg bert galdandi fyri brúk innan avtaluna við kommunurnar. Tað vísir seg at vera sera trupult at fáa upplýsingar, bæði frá fólkaskúlalærarum og musikkskúlanum sum heild. Seinast goldið varð út individuelt innan hetta avtaluøkið, varð mett, at bert 20% av samlaðu upphæddini kundi gjaldast út eftir upplýsingunum, og sjálvt hetta varð nokk sett ov høgt. Við ársenda 2025 fyrndust 714.547,95 kr. í hesum bólki.

Tilsamans fyrndust 1.280.363,78 kr. við ársenda 2025. Seinastu nógvu árini er meginparturin av tí fyrnda viðurlagnum goldið út umvegis fráboðan. Avgerð skal takast av stjórn og umboðsráði, um hetta skal verða leisturin aftur í 2026.

## Nýtsluhagtøl

**Nýtslukanningar í fólkaskúlanum**

Í samráð við leiðslurnar í Eysturskúlanum, Runavíkar kommunuskúla og Vágs skúla, varð fundur hildin við leiðsluna í Eysturskúlanum um nýggjan leist at fáa til vega upplýsingar um nýtslu innan fólkaskúlan. Leisturin við árligari spurnakanning gav ikki nøktandi úrslit. Umboð frá Fjølrit

greiddu frá leistinum, sum verður nýttur á fólkaskúlunum í Danmark, men leiðslan á Eysturskúlanum helt ikki líknandi skipan kundi lata seg gera í Føroyum. Hetta m.a. tí tað ikki ber til hjá leiðsluni at seta av løn til nakran at vera ábyrgdarfólk fyri skrásetingina. Tískil varð niðurstøðan, at skúlarnir útvega pensumlistar hjá framhaldsdeildini at grunda útgjald á. Hetta hevur við sær eyðsýndar vansar, eitt nú at bert framhaldsdeildin er umboðað, og at tilfar, sum ikki er próvtøkurelevant, ikki er til staðar í pensumlistanum.

Leisturin varð royndur í 2025, og hóast bert teir tríggir skúlarnir vóru við hesaferð, var úrslitið rúgvismiklari upplýsingar, enn áður við spurnakanningum til allar lærarar í landinum. Tilfarið gav ábending um avritan av 3.225 síðum, og samanborið við spurnakanningarnar, var besta úrslitið har 2.714 avritaðar síður. Verður nýggja mannagongdin víðkað til allar fólkaskúlarnar, við framhaldsdeild, væntast hetta at geva enn betur úrslit.

**Undirvísingarfrágreiðingar frá Miðnámi**
Viðgerðin av undirvísingarfrágreiðingunum frá Miðnámi fór fram á sama hátt sum áður, tó við smávegis formligum broytingum, við tí fyri eyga at spara um viðgerðartíðina. Triðingurin av undirvísingarfrágreiðingunum vórðu gjøgnum-gingnar, og varð bert nýtslan av føroyskum tilfari skrásett. Tilfarið gav ábending um 116.418 avritaðar síður.

**Upplýsingar frá Fróðskaparsetrinum**
Fjølrit hevur móttikið allar fílur, sum vórðu deildar við næmingar á Fróðskaparsetrinum á intranetinum Moodle í skúlaárinum 2021/22. Hesar vóru nakrar 11.000 í tali. 1.500 av hesum vórðu grovsorteraðar eftir tekstmáli, harav vóru 270 føroyskar fílur. Innihaldið í teimum 270 varð so kannað, og har talan var um vart tilfar, varð tað skrásett. Hetta gav ábending um avritan av 45.424 síðum, tá faldað varð upp við næmingatølunum til viðkomandi fílur.

## Útgjald

Eftir avtaluni við kommunurnar um nýtslu innan fólkaskúlar v.m., vórðu 893.184,94 kr. eftir til viðurlag, tá umsitingarkostnaður var drigin frá. Við støði í upplýsingunum í pensumlistunum varð avgjørt, at 20% av viðurløgunum undir avtaluni við kommunurnar kundi gjaldast út individuelt, og var hetta 178.636,99 kr. Av hesum lukkaðist at gjalda út 115.464,62 kr. til 30 rættindahavar. Restin av viðurlagnum, 714.547,95 kr., verður væntandi útgoldið eftir fráboðan í 2026.

Eftir avtaluni við MMR um nýtslu innan miðnám og hægri lesnað, vórðu 560.097,95 kr. eftir til viðurlag, tá umsitingarkostnaður var drigin frá. Tilfarið frá miðnámsskúlunum, Próvstovuni og Fróðskaparsetrinum var saman brúkt sum grundarlag undir individuella útgjaldinum av viðurløgum frá avtaluni við Mentamálaráðið. Av tí at stórur partur av tilfarinum, sum verður brúkt, bæði á miðnámi og á setrinum, er útlendskt, var avgjørt, at 40% av samlaðu upphæddini kundi gjaldast út. Hetta var 224.039,18 kr. Av hesum lukkaðist at gjalda út 126.413,73 kr. til 124 rættindahavar. Restin av viðurlagnum, 336.058,77 kr., fyrndist við ársenda 2025, og verður væntandi útgoldið eftir fráboðan í 2026.

Við hjálp frá danska systirfelagnum Tekst & Node, varð hagfrøðilig kanning av stakroyndunum innan fólkaskúlarnar, miðnámsskúlarnar og hægri lesnað gjørd. Kanningin hevði fyri eyga at kanna hvørt støddin á stakroyndunum er nøktandi. Roknað varð, at fyri at hava 95% vissu fyri, at øll verk, sum eru avritaði nóg mikið til at útloysa 100 kr. í viðurlagi, skulu stakroyndirnar hava fylgjandi støddir:

- Fyri fólkaskúlarnar skal stakroyndin vera: 20.561 avritaðar síður
  - Okkara stakroynd var á 3.225 avritaðar síður
- Fyri Miðnámsskúlarnar skal stakroyndin vera: 7.512 síður
  - Okkara stakroynd var á 116.418 síður
- Fyri Setrið skal stakroyndin vera: 3.894 síður
  - Okkara stakroynd var á 45.424 síður

Sum vit longu vistu, er stakroyndin fyri fólkaskúlarnar ov lítil, meðan hinar sýnast at vera nógv størri enn neyðugt fyri at náa ynskta neyvleikan.

Verður kanningin tikin í álvara, kunnu vit loyva okkum at skera væl niður í stakroyndunum fyri bæði miðnámsskúlarnar og Fróðskaparsetrið.

Eftir avtaluni við KVF, verður 10% tikið av fast í umsitingargjaldi, og vóru tá 257.979,89 kr. eftir til individuelt útgjald, eftir at umsitingin var drigin frá. Tað lukkaðist at gjalda út 211.058,94 kr., svarandi til 82%, til 38 rættindahavar. Viðurlagið fyrnast ikki fyrrenn við ársenda 2028, so tey resterandi 18% verða liggjandi til tá og verða útgoldin, skuldu viðkomandi rættindahavarar skrásett seg. Afturat teimum 211.058,94 kr., vórðu útgoldnar 44.946,09 kr. frá uppgerðum árini 2021-2024, í sambandi við at rættindahavar hava skrásett seg.

Afturat teimum individuellu útgjøldunum, varð í 2025 ein pulja áljóðandi 451.823,39 kr. lýst rættindahavum at søkja eftir fráboðan. Inn komu 207 fráboðanir, 16 vórðu vrakaðar, 141 vóru til heildarverk og 50 vóru til stakverk. Eftir treytum, ásett av stjórn og umboðsráði, varð 75% avsett til einstaklingar og 25% til forløg. Tað vóru 500 góðkendir lutir til einstaklingar, svarandi til 677,73 kr. pr. lut, og einum hámarki á útgjaldi á 13.554,60 kr. Fyri forløgini vórðu 114 góðkendir lutir, svarandi til 990,84 kr. pr lut, og einum hámarki á útgjaldi á 19.816,80 kr.

**NFOR-ráðstevna**
Við grundarlag í reglugerðini um Handfaring av viðurløgum, §4 stk. 5 pkt. (viðurløg, sum ikki kunnu býtast út), gjørdi stjórnin á fundi 10. apríl 2025 av at veita stuðul á 50.000 kr. til Rithøvundafelag Føroya.

Endamálið var at stuðla Rithøvundafelag Føroya fíggjarliga, í sambandi við, at felagið í mai mánaði var vertur fyri árliga fundinum hjá “Nordisk Forfatter- og Oversætterråd”, har áleið 40 fólk úr 19 limafeløgum luttóku. Høvuðsevnið í 2025 var vitlíki og rættindi hjá rithøvundum, týðarum og myndprýðarum.

## Tiltøk og fundir

**Aðalfundurin 2025**
Aðalfundurin 2025 varð ásettur at vera 10. februar 2025, men vegna uttanlandsferð (forkvinnan), varð aðalfundurin undantaksvís útsettur, og varð hann hildin í Hugskotinum 24. mars 2025. Øll, sum stóðu fyri vali, vórðu afturvald, og stjórnin skipaði seg beint eftir aðalfundin við Helle T. Johansen sum forfólki, Kim Simonsen sum næstforfólk og Beiniri Begsson sum kassameistara. Grannskoðaravirkið Januar varð eisini afturvalt sum grannskoðari.

**Umsitingin**
Stjórn og starvsfólk hava einans havt nakrar fáir arbeiðsfundir várið 2025. Ístaðin eru ivamál og samskifti annars farin fram umvegis telefon. Frá august 2025 flutti umsitingin hjá Fjølrit oman á Lützenstrøð, har LISA eisini hevur skrivstovu. Heystið 2025 var forkvinnan fyri Fjølrit eisini fyribils settur skrivara fyri LISA, og hevur samskiftið í tí tíðarskeiðnum verið nærum dagliga.

**Árligi Norðurlendski stórfundurin**,
Hesin fundur var í Oslo 11. – 13. Juni 2025, og høvuðsevnið var vitlíki, og hvørja ávirkan tað hevur á kreativa framleiðslu / upphavsrættindi.

Framløgur vóru, við ymiskum hugburðum til vitlíki, líka frá marrukendum framtíðarhugsjónum til prutlandi tankar um møguleikar. Óansæð hugburð, so eru avbjóðingar við, hvussu vit kunnu tryggja, at upphavsrættindini verða vird, og at rættindahavar fáa nýtslugjald fyri brúk í sambandi við vitlíki.

Vit í Norðurlondum eru lík innan nógv øki, men lóggávuna innan upphavsrættindini, umframt umstøðurnar fyri at varðveita og menna mál, list og mentan eru ólík. Semja var tó um at orða eina felags yvirlýsing, har heitt verður á landsins politikkarar um at hava upphavsrættindini í minni og at seta krøv til vitlíki.

**Kommunikatións- og Statistikkfundur**
Norðurlendsku systurfeløgini hittust í Stokkhólmi 24. – 25. apríl 2025 á tveimum samstundis fundum, einum um hagtøl og innsavning av nýtslutølum, og einum um samskifti, kunning og PR. Fyri Fjølrit luttók KT-mennarin á fyrrnevnda fundi, og aðalskrivarin á hinum.

**Ársfundurin og árliga ráðstevnan hjá IFRRO**
Evropeiska deildin í altjóða upphavsrættar-sambandinum IFRRO skipaði fyri fundi og ráðstevnu í Luxembourg í maj mánað 2025. Altjóða

ársfundurin hjá IFRRO var 27.-30. oktober 2025 í Singapore. Stjórn og starvsfólk gjørdu av ikki at taka lut á hesum fundum í 2025.

**Umboðsráðsfundur**
Var 9. oktober 2025. Endamálið var millum annað at kunna um ætlaðar viðtøkubroytingar, og hví tað tykist neyðugt. Fyri at kunna gera løgfrøðisligt haldbarar avtalur, sum hava við vitlíki at gera, heldur stjórnin, at tað er neyðugt at tillaga viðtøkurnar, og heitti á limafeløgini um at kanna sínar egnu viðtøkur, við hesum í huga. Tryggjast má, at limirnar hava givið Fjølrit heimild til at gera avtalur um nýtslu, avritan og nýtslu í sambandi við vitlíki.

**Læraradagar í NLH**
Árligu læraradagarnir í Norðurlandahúsinum, sum Nám skipaði fyri í fleiri ár, og sum Fjølrit vanliga luttók á við egnum bási, hava ikki verið hildnir seinastu tvey árini.

**Árligu bókadagarnir**
Saman við Rithøvundafelag Føroya og Norðurlandahúsinum varð skipað fyri pallborðskjaki um mál, rættindi og vitlíki. Heitið var: “Hví skulu vit skriva føroyskt?”. Kjakast varð um føroyska málið, um bókmentirnar og hvørja ávirkan vitlíki kann hava.

**Software til handfaring av viðurløgum**
Onlinefundur varð við WIPO (World Intellectual Property Organization), har tey greiddu frá, hvørja skipan tey nýta til handfaring av viðurløgum.

**Vitlíki og avtalur**
Tekst&Node skipaði 6. mars 2025 fyri evnisfundi í Keypmannahavn, har tosað varð um, hvussu avtalur kunnu gerast, ið tryggja viðurlag til rættindahavar, í sambandi við nýtslu av vitlíki. Aðalskrivarin, Arnbjørn Ó. Dalsgaard, og Jónas Tór Næs, løgfrøðingur, luttóku.

Tosað varð millum annað um, hvørt felagið hevur heimild í lógini umframt frá limunum at gera avtalur um brúk av upphavsrættarvardum tilfari í vitlíkistøkni, og hvussu tílíkar avtalur kunnu síggja út.

## Ætlanir fyri 2026

Felagsavtalan við kommununar og Undirvísingarstýrið má fáast uppá pláss, eins og ein avtala við Fólkakirkjuni. Ískoytisavtala má gerast við Kringvarp Føroya um nýtslu av myndatilfari, í sambandi við, at kringvarpið leggur upplesingar og útvarpsleikir út á netið.

Fleiri onnur øki eru, har vard verk verða nýtt, og har vit eiga at gera avtalu fyri at tryggja nýtslugjald til rættindaeigarar. Sum dømi kunnu nevnast skeiðsfyriskiparar, listasøvn, bókasøvn, landssøvn, og ikki minst innan menning og nýtslu av vitlíki.

Havast má alsamt í huga, hvussu arbeiðsorkan verður nýtt, og at halda umsitingarútreiðslurnar so lágar sum til ber. Innkomin nýtslugjøld skulu í størstan mun rindast út til rættindahavarar og koma føroyskari list og mentanarlívi til gagns.

> *Vitanin um, hvørji verk eru nýtt, og hvør ið er rættindahavi, liggur hjá brúkaranum, og er tað tí brúkaran, ið onkursvegna má lata Fjølrit hesar upplýsingar.*

